# Uppsøgnin kom úr bláum lofti

**Leiðslan í HB er farin at leita eftir venjara fyri komandi kappingarár**

UPPSØGN
*Jóannes Hansen*



*Vit ivast ikki um dygdirnar hjá honum. Úrslitini hava talað fyri seg, men í ár hevur tað ikki hepnast, og vit hava tikið til eftirtektar, at venjarin segði upp mánadagin, sigur Steinfinn Mittelstein.*

Í blaðnum í gjár gjørdu vit burturúr vánaligu støðuni hjá HB. Nevndarformaðurin í Havnar Fótbóltur, Kaj Leo Johannesen, bedýraði, at teir høvdu ikki hugsað um at siga venjaranum upp. Blaðið var komið í onkrar leysasølur, men tað var so langt í frá komið til haldararnar, tá tað tíðliga mánakvøldið stóð á heimasíðuni hjá HB, sum uttan sammeting er besta føroyska fótbóltsheimasíðan, at nú hevði Ion Geolgau sagt upp.

Visti tú hetta, Kaj Leo Johannesen, tá tú segði okkum, at tit høvdu ikki hugsað um at siga venjaranum úr starvi?

– Nei. Ion segði upp mánadagin, og tað var ikki fyrrenn mánakvøldið, at vit tóku nýggju støðuna til viðgerðar, sigur Kaj Leo Johannesen, sum annars vísir til stjóran í felagnum, Steinfinn Mittelstein.

– Vit harmast um, at Ion hevur lagt frá sær. Umstøðurnar hjá honum hava verið ógvuliga truplar í ár. Vit ivast ikki um dygdirnar hjá honum. Úrslitini hava talað fyri seg, men í ár hevur tað ikki hepnast, og vit hava tikið til eftirtektar, at venjarin segði upp mánadagin, sigur Steinfinn Mittelstein.

Nevndin hevur heitt á Inga Rasmussen um at taka sær av venjingini tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum.

Verður hann eisini venjari komandi ár?

– Tað dugi eg ikk at siga. Sáttmálin hjá Ion var eisini galdandi fyri komandi ár, so tað er ein púra nýggj støða, sum hevur tikið seg upp aftaná at hann segði upp. Men vit arbeiða við komandi ári, sigur Steinfinn Mittelstein, sum leggur afturat, at í HB hava teir havt stóra virðing fyri nú fyrrverandi venjaranum.

### Vónbrotið

Tað er kortini eingin loyna, at tað hava verið tey í HB, sum hava hildið, at tað var neyðugt at skifta venjaran út. Samstarvið hevði ikki borið í einum nýggjum ári, hevur verið mett.

Og á almennu heimasíðuni hevur tað ikki verið frítt, at tað í dystarum-røðunum hevur verið funnist at venjaranum og mátanum, sum hann hevur sett liðið uppá.

*Er tað ikki óheppið?*

– Eg haldi ikki, at tað skal leggjast meiri í tað, enn at tað eru nógvir ørkymlaðir HB arar, tí gongdin hevur verið so vánalig, sum ongantíð áður, heldur Steinfinn Mittelstein.

# Formenn og stjórar

Í blaðnum í gjár høvdu vit samrøðu við Kaj Leo Johannesen um støðuna hjá HB.

Sum vit hava skilt á lagnum, hevur tað ørkymlað onkrar lesarar, vit tá nevndu Kaj Leo fyri formann í Havnar Bóltfelag.

Vit skulu tí gera vart við, at bygnaðurin í HB at kalla er tvíbýttur. Í móðurfelagnum, sum er Havnar Bóltfelag, er Birgir Enghamar formaður.

Í P/F Havnar Fótbóltur, ið er partafelagið, sum tekur sær av fyrstudeildarliðnum hjá HB, er Steinfinnur Mittelstein formaður, meðan Kaj Leo Johannesen er nevndarformaður.

*- jm*

# Stigatalvan

Niðanfyri prenta vit støðuna í 1. deild undan dystinum í Gøtu mikukvøldið. Viðmerkjast skal, at í uppgerðini í gjár var eitt mistak íkomið. KÍ hevur nevnliga vunnið báðar innanhýsis dystirnar móti VB, og eru tí framman fyri vágbingar á stigatalvuni, hóast VB hevur ein betri málmun.

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 51 | 12 | 39 | 40 |
| 2 | GÍ | 14 | 11 | - | 2 | - | 1 | 43 | 15 | 28 | 35 |
| 3 | B68 | 15 | 8 | - | 2 | - | 5 | 30 | 20 | 10 | 26 |
| 4 | KÍ | 15 | 7 | - | 0 | - | 8 | 22 | 34 | -12 | 21 |
| 5 | VB | 15 | 6 | - | 3 | - | 6 | 32 | 21 | 11 | 21 |
| 6 | NSÍ | 15 | 5 | - | 4 | - | 6 | 18 | 20 | -2 | 19 |
| 7 | HB | 14 | 5 | - | 2 | - | 7 | 24 | 20 | 4 | 17 |
| 8 | EB/Streymur | 15 | 5 | - | 1 | - | 9 | 19 | 28 | -9 | 16 |
| 9 | B71 | 15 | 3 | - | 1 | - | 11 | 14 | 38 | -24 | 10 |
| 10 | FS Vágar | 15 | 3 | - | 0 | - | 12 | 16 | 61 | -45 | 9 |

GÍ-HB:

# GÍ skal minka um munin

**Í Gøtu er ein sigur á HB eitt krav, um tað skal eydnast teimum at vinna oddasessin aftur**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Gøtumenn rokna við einum torførum dysti, hóast HB ikki hevur staðið seg nakað serligt higar til í ár*

Hóast bæði kreppa og venjaraskifti sveima í hugaheiminum hjá HB-leikarunum, so skulu teir í løtuni royna at savna tankar sínar um torføru uppgávuna í Gøtu mikukvøldið.

Tá hitta teir eitt GÍ lið, sum í alt ár hevur tókst at verið sera væl fyri, og sum eftir ein lítlan steðg í stigasavnanini nú veruliga skal hava ferð á, um tað skal eydnast teimum at taka B36 á fremsta plássinum.

### Væl fyri

Í Gøtu ásanna tey eisini, at tað ikki eru ráð at missa fleiri stig, um tað skal eydnast at vinna B36 aftur.

- Vit fara sjálvandi altíð á vøllin fyri at vinna, og tú kanst eisini siga, at vit eru noyddir at vinna, heldur Magni Jarnskor, sum er liðskipari hjá GÍ.

Magni heldur annars, at GÍ er so hampuliga væl fyri, nú teir gera seg til at avgreiða útsetta dystin. Bartal Eliassen hevur leikbann, og enn er óvist, um tað fer at eydnast at fáa Pól Ennigarð upp til dystin. Hann er í løtuni í Danmark á Skúla, og hevur longu mist fleiri tímar orsakað av fótbóltinum.

- Tað verður so í øllum førum ein missur, um hvørgin teirra er við, men eg rokni so undir øllum umstøðum við einari truplari uppgávu. Tað hevur kanska ikki gingist so væl hjá HB seinastu dystirnar, men HB er HB, og eg ivist ikki í, at teir fyrr ella seinni fara at reisa seg aftur, sigur Magni Jarnskor at enda.

### Aftur broytingar

Í HB er ivaleyst nógv annað dysturin móti GÍ, sum melur í heysunum á leikarunum, men í øllum førum kann tað vera ein lítil troyst, at hópurin tykist sterkari nú, enn hann var, tá liðið sunnudagin var á Sandi.

Janus M. Joensen og Allan Mørkøre verða so báðir við aftur, men hinvegin hevur Bárður Mortansson nú leikbann, eftir at hann varð rikin av vølli á Sandi. Jóhannis Joensen hevur eisini leikbann, so tað er ikki óhugsandi, at onkrir av veteranunum, sum vóru við á Sandi, aftur verða við mikukvøldið. Mest nærliggjandi er helst at taka Gunnar Mohr og Eyðun Samuelsen við, nú álopið aftur tykist skert, men heldur ikki er óhugsandi, at Ingi Rasmussen verður við, og seinastu tíðindini benda í øllum førum á, at verður at síggja onkra staðni á beinkinum.



# Aftur nýggjur venjari í FCK



*Niels Christian Holmstrøm fekk bara ein dyst sum FCK-venjari, men ivaleyst hevur hann einki ímóti, at Hans Backe nú hevur tikið yvir í heita sessinum*

**Hans Backe, sum vandi AaB, tá teir vóru á Tórsvølli, verður nýggjur venjari hjá Toda Jónsson og liðfeløgunum í FCK**

VENJARASKIFTIÐ
*Jóannes Hansen*

Teir skifta venjarar nógv oftari, enn ein sluppfiskimaður skifti undirklæði. Í fyrradagin varð alment, at nú hevur felagið hjá Toda Jónsson fingið ein nýggjan venjara, og at talan hesa ferð verður um ein, sum teir ætla skal vera í felagnum næstu trý árini.

Nýggi venjarin eitur Hans Backe. Hann er svenskari, og hann er ikki heilt ókendur í Føroyum. Tá almenni vígsludysturin av Tórsvølli varð spældur fríggjadagin 9. juli, var mótstøðuliðið hjá landsliðnum AaB. Danska felagið vann 3–1, og venjari hjá teimum var hesin Hans Backe, sum nú skal venja Toda Jónsson og hinar í FCK.

Stutt frammaundan at teir komu til Føroya høvdu teir í AaB vunnið donsku landskappingina.

### Ståle viðmælti

Týdningarmiklasti lyklaspælarin í Aalborg í 1999 var norski Ståle Solbakken. Seinni flutti hann til FCK, og ivaleyst minnast tey flestu, hví hann noyddist at gevast við fótbóltinum.

Í FCK hava teir spurt seg fyri hjá Ståle Solbakken, og hann hevur ikki ivast. Hans Backe er besti venjarin, sum hann hevur havt. Tað hevur FCK lagt stóran týdning í. Teir hava keypt svian leysan av sáttmálanum, sum hann var bundin av í Eysturríki, og í komandi viku verður Hans Backe FCK venjari.

– Hetta er eitt dreymastarv, sigur sviin.

Í annaðkvøld skal FCK spæla í UEFA Cup ímóti Obelic. Talan er um jugoslaviska liðið, sum sendi GÍ úr kappingini. Í tí dystinum og aftur tá FCK sunnudagin fer at spæla landskappingardyst ímóti oddaliðnum Brøndby, fer Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjórin í FCK, at hava ábyrgdina av liðnum, men so kemur sviin.

Í umrøðuni av nýggja FCK venjaranum verður sagt, at hann hevur stórt innlit í fótbólt, og at hann er ein harður hálsur, sum kallar ein spaka fyri ein spaka. Hetta minnir nógv um tað, sum varð sagt um Roy Hodgson. Hann var virdur millum spælararnar, og hann megnaði at vinna DM. Tí verður roknað við, at tað fer at rigga væl við nýggja venjaranum, og í FCK leiðsluni og millum spælararnar verður vónað, at tað nú fer at verða friður – í hvussu so er tá tað snýr seg um venjaran!

# AGF vann fyri fyrstu ferð

**Unga liðið úr Vejle var fyri ongum ímóti trongda heimaliðnum í Århus**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Mánakvøldið hittust jysku feløgini, AGF og Vejle, í Århus. Í tíðini eftir 2. heimsbardaga vóru hesi bæði feløgini leingi millum tey størstu og mest vinnandi og virdu í Danmark.

Men síðstu árini hevur tað verið nógv upp og niður. Hjá AGF hevur tað skorist so mikið illa, at teir onkra ferðina hava verið í næstbestu deildini, og fíggjarliga eru teir framvegis so mikið illa fyri, at hóttanin um húsagang ikki er heilt burtur.

Vejle fór so logandi av knóranum fyrst í níti árunum. Í summar megnaðu teir at spæla seg aftur í bestu deildina, eftir at teir høvdu verið eitt ár í næstbestu deildini.

Fyrstu umførini í nýggja umfarinum hevur tað hilnast betur hjá Vejle, enn tað hevur hjá AGF, sum ongantíð hevur vunnið, men mánakvøldið var eingin ivi. AGF vann 3–0. Teir skoraðu øll málini í 1. hálvleiki, og teir kundu havt skorað uppaftur fleiri mál.

Vejle hevur eitt sera ungt lið. Mánakvøldið vóru tveir 16 ára gamlir dreingir á liðnum, og tað verður mett at felagið fer at eiga góða framtíð, um tað eydnast at halda upp á fólkið. Tað er so ein heilt annar spurningur.

Toppskjúttin undan summarsteðginum, Bo Nielsen, legði AGF framum, tá sjey minuttir vóru farnir. Hini bæði málini skoraði Nocko Jokovic. Tað var kærkomið bæði hjá spælaranum og felagnum. Miðframherjin hevði ikki skorað síðani eina ferð í mai mánað.

Og so var tað um reppið, at málskjúttin ikki fekk høvi at vísa, hvat hann dugur til. Í fyrstu minuttunum mánakvøldið var úti við síðulinjuna orðadráttur millum hann og venjaran, John Stampe. Tað var um reppið, at venjarin tók álopsspælaran av vøllinum. Ivaleyst vóru bæði venjarin og spælarin seinni mánakvøldið glaðir um, at tað at enda tørnaði út, sum tað gjørdi!

# Ingi hevur ikki droymt um starvið

**Eftir áheitan frá spælarunum hevur leiðslan heitt á Inga Rasmussen, ið hevur alt gott at bera venjaranum, sum nú hevur lagt frá sær**

Í SESSIN
*Jóannes Hansen*

Í kvøld verður tað Ingi Rasmussen, sum í Gøtu fer at hava ábyrgdina av HB liðnum. Saman við Sámal Erik Hentze, sum hevur havt ábyrgdina av næstbesta liðnum, skal hann standa fyri venjingini.

Ætlanin er, at 1. og 2. lið skulu venja saman tað, sum er eftir av árinum. Tað hevur ikki verið vanligt í tíðini hjá nú fyrrverandi venjaranum.

Ingi Rasmussen hevði í 1999 saman við Peturi Simonsen ábyrgdina av næstbesta HB liðnum, men hann sigur seg ongantíð hava droymt um at gerast venjari hjá 1. deildarliðnum:

– Yvirhøvur ikki. Leiðslan heitti á meg mánakvøldið. Teir søgdu, at spælararnir høvdu mælt til hesa loysnina, og so fara vit at gera okkara besta. Tað ræður um at fáa sum frægast burturúr teimum vikunum, sum eru eftir av kappingarárinum.

### Virðingin

Ingi Rasmussen hevur í nógv ár verið stríðsmaður á HB miðvøllinum. Í fjør boðaði hann frá, at nú fór hann at gevast í fremstu røð, tí tað var ov tíðarkrevjandi.

Ingi var við, tá HB í 1998 vann FM og løgmanssteyp, og hann hevur alt gott at bera manninum, sum hann nú skal loysa av:

– Tað er ein harmulig støða í ár. Men eg havi ongantíð ivast í, at HB hevur havt ein góðan venjara. Bæði persónliga og fakliga havi eg sera stóra virðing fyri honum. Ion hevur spælt 24 landsdystir fyri Rumenia, og hann hevur nógvar royndir á hægsta støði – bæði sum spælari og venjari. Eg havi ongantíð upplivað ein venjara, sum hevur havt so nógv at oysa av. Tí er tað eyka harmuligt, at umstøður, sum venjarin ikki hevur verið harri yvir, hava verið við til at mynda veruleikan, sum hann nú er.

# KÍ meistari hjá kvinnum

**Hóast tað enn resta tvey umfør í bestu kvinnudeildini, so hevur KÍ longu tryggjað sær gullmerkini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hetta gjørdist greitt, tá KÍ leygardagin vann ein syngjandi stórsigur suðuri á Sandi, samstundis sum argastu kappingarneytarnir úr B36 taptu 1-0 fyri grannunum úr HB.

Hóast tær sostatt í hesum umfarinum fingu hjálp frá HB, so var tað tó helst bert ein spurningur um tíð, áðrenn KÍ tryggjaði sær FM-heitið. Undan hesum umfarinum vóru tær nevnliga trý stig framman fyri B36, og tá KÍ samstundis hevði vunnið báðar innanhýsis uppgerðirnar móti árstalsfelagnum, skuldi nógv broytast hesi seinastu umførini, um B36 skuldi hava møguleika at røkka gullmerkjunum.

### Fult uppiborið

Tá tikið verður saman um kappingarárið, er heldur einki at ivast í, at KÍ var rætti vinnarin av deildini. Kappingin í ár varð skipað soleiðis, at liðini fyrst dystaðust í einum grundspælið, og har varð avgjørt, hvørji lið skuldu dystast í 1. deild í heyst.

KÍ vann leikandi lætt hetta grundspælið, men tá stig og mál vórðu nullstillað í summarfrítíðini, máttu klaksvíkingarnir byrja av nýggjum í august mánaði. Her vóru tær tíðliga fyri einum skelki, tá tær taptu greitt fyri VB, men síðani hevur bert gingið ein veg. KÍ hevur vunnið allar dystirnar upp í slag, og eiga tí væl og virðiliga uppiborið, at tær nú annað árið á rað kunnu rópa seg føroyameistarar.

Sum støðan er í løtuni tykist B36 at fara avstað við silvurmerkjunum, eftir at tær annars vóru vánaligasta liðið í grundspælinum, meðan steypavinnararnir úr HB helst vinna sær bronsumerkini.